**Semja**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**YTF**

**galdandi fyri Elektron**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at broyta ásetingar í verandi sáttmála soleiðis:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

   1. juni 2021 hækkar lønin við 1,4496%.

   1. juni 2022 hækkar lønin fyrst við 0,4832% roknað av lønini í apríl 2021, og við støði í hesum hækkar lønin síðani við 1,25%.

2. Grein 5, stk. 4 verður broytt til:

   *"Um lønarsamrøðan ikki er hildin innan 1. november, verður lønarískoyti fyri starvsfólk, sum ikki hava havt lønarsamrøðu, hækkað samsvarandi lønarhækkingini á minstulønunum afturvirkandi frá 1. juni. Leiðslan innkallar til lønarsamrøðu við í minsta lagi 14 daga freist. Um avtala ikki fæst í lag, ella um starvsfólkið ikki møtir til samrøðuna, áliggur tað starvsfólkinum at avtala eina nýggja lønarsamrøðu í samráð við leiðsluna. Heldur starvsfólkið ikki nýggju avtaluna, verður lønarískoytið óbroytt."*

3. Samlagstrygging í grein 9, stk. 4 verður dagførd til at fevna um hoyritól og dekningurin við deyða verður 800.000 kr. uttan lækking.

   Sett verður inn nýtt stk. 8 í grein 9, sum sigur: "*Partarnir eftirmeta tryggingarnar til sáttmálasamráðingarnar fyri at tryggja, at hesar eru kappingarførar.*"

4. Orðingin í grein 12, stk. 1 og stk. 2 verður broytt til:
   *"Stk. 1 Starvsfólk hava frí uttan lønarfrádrátt at ansa sjúkum barni, sum er undir 18 ár og sum er heima, tó í mesta lagi í 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar um árið samanlagt. Eigur starvsfólk 2 børn ella fleiri undir 18 ár, kann tað fáa frí upp í 20 dagar um árið.*

*Stk. 2. Verður sjúkralega barnsins longri enn áður nevndu 2 dagar, kann starvsfólkið eftir umbøn fáa farloyvi uttan løn í upp til 5 arbeiðsdagar afturat."*

5. Í grein 13 verður nýtt stk. 3 soljóðandi:

   *"Fyritøkan hevur skyldu til, í góðari tíð, vanliga 3 dagar, at senda YTF og Føroya Arbeiðsgevarafelag avrit av øllum uppsøgnum av starvsfólki, sum hesin sáttmálin fevnir um."*

6. Í grein 16, stk. 1 verður orðið "*varalimir*" strikað.

7. Partarnir eru samdir um, at leiðslan saman við samstarvsnevndini arbeiðir við nýggjum orðingum til "Skjal 1: Flokkingar og minsta løn" í sáttmálaskeiðnum. Endamálið er at dagføra flokkingaryvirlitið soleiðis, at yvirlitið samsvarar við arbeiðið í Elektron. Semja er um, at uppskotið verður lagt afturat sáttmálanum til komandi samráðingar.

8. Tilvísingar og dagføringar í sáttmálanum verða rættaðar soleiðis:

   - Í seinna reglubroti í § 9, stk. 1 verða % satsirnir dagførdir.
   - Í síðsta reglubroti í § 9, stk. 3 verður tilvísingin dagførd.
   - Í § 10 verður tilvísingin til løgtingslóg um barsilsskipan dagførd.
   - Strikað stk. 4 í § 15 um innvinningarárið.
   - Í § 21, stk. 3 verður tilvísingin til løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi dagførd.
   - Orðið "starvsavtala" verður rættað til "sáttmáli"

9. Í grein 23 verður "*1. juni 2019*" broytt til "*1. juni 2021*" og "*31. mai 2021*" broytt til "*31. mai 2023*".

Tórshavn, 25.05.2021

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Márita Rasmussen, samráðingarleiðari

**Fyri YTF**

Durita Kjærbo, forkvinna